# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Frá hesum degi nýtist Russlandi og russiska fólkinum ikki at stúra fyri sínari trygd ella verju*

*(Sergej Ivanov)*

# Hillary og Rudolph á odda



*Rudolph Giuliani*



*Hillary Clinton*

**Tað verða helst senatorurin og fyrrverandi borgarstjórin í New York, sum fara at stríðast um forsetaembætið**

Hjá demokratunum í USA er spurningurin, um flokkurin skal stilla Hillary Clinton ella Barrack Obama upp á forsetavalinum næsta ár. Republikanararnir hava harafturímóti fleiri at velja ímillum, men oddafiskarnir eru eftir øllum at døma Rudolph Giuliani, Mitt Romney og John McCain.

Er ein nýggj meiningakanning eftirfarandi, vilja 35 prosent av teimum demokratisku veljarunum hava Hillary Clinton, senator í New York, til forsetavalevni. Barrack Obama, sum eisini er senatorur, fær stuðul frá 26 prosentum.

Millum teir republikonsku veljarararnar hevur Rudolph Giuliani, fyrrverandi borgarstjóri í New York, størstu undirtøkuna. 25 prosent vilja hava hann til forsetavalevni hjá republikanarunum, 16 prosent vilja hava guvernørin Mitt Romney, og 15 prosent siga senatorin John McCain vera tað besta valevnið.

# Russiskar rakettir sleppa ígjøgnum amerikonsku rakettverjuna

**Rakettverjuætlanin hjá USA fekk russar at menna nýggjar rakettir, sum kunnu sleppa ígjøgnum verjuna. Tær fyrstu eru nú royndar**

– Frá hesum degi hevur Russland nýggjar rakettir, sum kunnu fara ígjøgnum allar verandi og komandi verjuskipanir. So russar kunnu kenna seg tryggar, hvat viðvíkur verju og trygd, sigur Sergej Ivanov, uttanríkisráðharri, við tíðindastovuna Interfax.

Interfax og aðrar russiskar tíðindastovur greiddu í gjár frá, at russiska verjan hevði roynt nakrar nýggjar rakettir við góðum úrsliti. Millum annað hevði verjan roynt eina langtberandi rakett, sum kann hava fleiri kjarnorkuløðingar. Rakettin varð skotin út á einari støð í Plesetsk í útnyrðingspartinum av Russlandi, og hon rakti tað ætlaða málið á Kamtjatka-nesinum 5.500 kilometrar longri eysturi.

Russiskir leiðarar hava í seinastuni funnist hvassliga at USA, tí landið ætlar at seta rakettir upp í Póllandi og Kekkia sum lið í teirri ætlaðu rakettverjuætlanini. Russar hava sagt, at amerikanska ætlanin elvir til nýggja vápnakappdubbing, og at Russland fer ikki at sita hendur í favn.

Russiski vápnaserfrøðingurin Aleksandr Pikajev sigur við vesturlendskar fjølmiðlar, at tær nýggju russisku rakettirnar eru uttan iva betri førar fyri at sleppa ígjøgnum ymsar verjuskipanir enn tær gomlu rakettirnar. Pikajev sigur, at Russland hevur ikki havt annað í at velja enn at menna eina nýggja langtberandi rakett við fleiri spreingiløðingum, eftir at USA ógildaði ta gomlu avdubbingaravtaluna við Sovjetsamveldið fyri fimm árum síðani.



*Sergej Ivanov, uttanríkisráðharri*

STUTT SAGT

## Eftirmaðurin funnin

Tað verður eftir øllum at døma amerikanski varauttanríkisráðharrin Robert Zoellick, sum skal taka við sum stjóri í Heimsbankanum eftir landsmannin Paul Wolfowitz, sum noyddist at leggja frá sær í síðstu viku. Robert Zoellick hevur drúgvar royndir sum amerikanskur samráðingarleiðari í ymsum handilssamráðingum, og sum varauttanríkisráðharri hevur hann staðið á odda fyri amerikonsku samráðingunum um Darfur-landspartin í Sudan. Sum diplomatur er Robert Zoellick væl lýddur í Evropa, og tað er ein fyrimunur, sum hann hevur fram um undanmann sín í stjórastarvinum í Heimsbankanum.

## Í lagi at lurta

Teir fýra borgarligu stjórnarflokkarnir í Svøríki samdust í gjár um at loyva løgregluni at hava eftirlit við telefonsamrøðum, posti og øðrum samskifti hjá fólki, sum eru undir illgruna fyri at vera uppi í onkrum ólógligum. Harumframt fær løgreglan eisini loyvi at brúka myndatól til at hava eftirlit við fólki. Einstøk undantøk eru tó. Eitt nú sleppur løgreglan ikki at hava sama eftirlit við tíðindafólkum og prestum. Stjórnini nýtist ikki at stúra fyri politiskari mótstøðu ímóti uppskotinum, tí sosialdemokratarnir taka undir við tí.

## Deyðadóm fyri rúsevni

Hægstirættur í Indonesia hevur dømt fimm kinesarar, ein fransmann og ein niðurlending til deyða, eftir at teir vóru funnir sekir í at hava skipað fyri umfatandi rúsevnisframleiðslu í høvuðsstaðnum Jakarta. Hægstirættur sigur í úrskurðinum, at teir sjey menninir hava framleitt fleiri milliónir ecstasy-tablettir, og at teir uttan iva høvdu byrjað av nýggjum, fingu teir loyvi at liva. Menninir eru stutt sagt ein hóttan ímóti komandi ættarliðum og hava tí fingið deyðadóm, sigur rætturin.